## Sparkivøllur í Skálafirði

Runavíkar Býráð hevur samtykt at keypa lendi í Skálafirði til sparkivøllin. Tað vóru bygdarfólk í Skálafirði, sum hava vent sær til býráðið við ynski um at fáa ein sparkivøll í Skálafirði. Tey skutu upp, at vøllurin verður lagdur vestan fyri Dvørgasteinar. Men í bygdarætlanini er tað lagt av til fríøki og tí kann vøllurin ikki leggjast har. Hinvegin ber væl til at leggja hann á stykkið beint sunnanfyri, har tað ber til at byggja hugnaøki og spælipláss. Sostatt samtykti býráðið at keypa lendi til sparkivøllin á hesum stykkinum. **-áki-**



## Løgreglubilur álopin

Leygarnáttina varð ein maður tikin í Havn fyri at gera seg inn á ein løgreglubil. Løgreglan var í býnum, men tað toldi ein maður nokk ikki, tí hann knallaði nevan tvær ferðir harðliga niður í bilin. Men tað sleppur hann ikki burturúr uttan nakað, tí slíkt verður ikki góðtikið. Tað kostaði honum eina nátt á aftanfyri rimarnar á løgreglustøðini og seinni fær hann so eina bót afturat.**-áki-**

# Hetta er sum í eini bananrepublikk

**Høgni Hoydal heldur tað vera harmuligt, at serfrøðingar og pressan ikki lýsa óhepnu stjórnarskipanarligu avleiðingarnar av uppskotinum um at stytta freistina at útskriva val**

POLITIKKUR
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*



*-Føroyar minna um tey londini, vit avgjørt ikki vilja samanberast við, heldur Høgni Hoydal*

Fólkaræðisliga støðan í Føroyum er sum í bananrepublikkunum, sum vit ikki vilja sammeta okkum við.

Tað heldur formaðurin í Tjóðveldi, Høgni Hoydal:

- Samgongan skilmarkar fólkaræði sum at meirilutin ræður. Hetta er langt við síðuna av. Fólkaræði er, at tað verður ansað eftir, at eingin ger seg inn á stjórnarligu skipanirnar, sum fólkið hevur samtykt. Í hesum plaga pressan og serfrøðingar at hava stóran leiklut, men soleiðis hevur tað ikki verið í Føroyum, nú samgongan hevur samtykt, at hon skal hava longri tíð at fremja sínar ætlanir, enn tað altíð hevur verið siðvenja.

Sipað verður til samtyktina leygardagin um at stytta freistina fyri at útskriva løgtingsval.

Marjus Dam og Poul Michelsen, samgongutingmenn, vístu á, at landsstýrið hevur fingið styttri freist, enn tað sjálvt hevði roknað við. Landsstýrið legði upp til tríggjar vikur freist, men í álitinum frá rættarnevndini skýtur meirilutin upp, at freistin skal verða fýra vikur.

– Hetta er talan um reina bananrepublikkstøðu. Landsstýrið ætlaði at økja um valdstíðarskeiðið í tríggjar vikur, men tá ið freistin nú verður økt við tveimum og ikki trimum vikum, so verður sagt, at landsstýrið hevur ikki fingið sín vilja, segði Høgni Hoydal, formaður í Tjóðveldinum.

# 110 mál fáa nevndarviðgerð í hesi vikuni

**Flestu málini verða viðgjørd í vinnunevndini, sum á trimum fundum skal viðgera 42 mál.**

POLITIKKUR
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Løgtingið leggur nógv arbeiði á seg sjálvt nú í sluttspurtinum upp undir løgtingsvalið. Fundur var stóran part av leygardegnum, og næsti tingfundur er ásettur at verða seinnapartin í morgin, týsdagin, tá ið tólv mál eru á skrá.

Í hesi vikuni eru nógvir nevndarfundir á skránni, og tað eru ikki hissini arbeiðsbyrðar, sum eru fyri framman.

Tingnevndirnar skulu sambært dagsskránni viðgera 110 mál í hesi vikuni. Flestu málini eigur vinnunevndin, sum á trimum fundum skal viðgera 42 mál.

Trýstið er ógvuliga stórt á fíggjarnevndini, sum umframt 28 tingmál á tveimum fundum í hesi vikuni, eisini hevur fíggjarlógina at hugsa um.

Í dag, mánadagin verður eingin tingfundur, og tá eru fundir ásettir at vera í rættarnevndini, fíggjarnevndini og vinnunevndini.

Rættarnevndin skal viðgera átta mál í dag, fíggjarnevndin skal viðgera fjúrtan mál, og vinnunevndin skal viðgera fjúrtan mál.

Trivnaðarnevndin skal fyrrapartin í morgin, týsdagin, viðgera tólv tingmál, og vinnunevndin skal sama fyrrapart viðgera fjúrtan tingmál.

Fyrrapartin mikudagin skal mentanarnevndin viðgera tvey mál, og sama fyrrapart skal fíggjarnevndin viðgera fjúrtan mál.

Hósdagin skal trivnaðarnevndin viðgera trettan mál, og vinnunevndin skal viðgera fjúrtan mál.

Fyrrapartin fríggjadagin tann 7. desember verður fundur í mentanarnevndini við dagsskrá, sum fevnir um fimm løgtingsmál.

# Hvast orðaskifti í tinginum

**Samgongan leggur vertin á fólkaræði og meiri av tí skuffuni var í luftini í Løgtinginum leygarmorgunin**

POLITIKKUR
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Í góðveðrinum leygardagin, ímeðan onnur hildu vikuskifti, var tingfundur, og tað gekk harðliga fyri seg.

Í fríggjakvøldið hugnaðu tingmenn og landsstýrismenn sær í jólaborðhaldi. Tingfundurin, sum var niðurlagdur eftir klokkan fýra fríggjadagin, varð tikin uppaftur klokkan 10 leygarmorgunin og orðaskiftið var hvast.

Serliga hart var orðaskiftið, tá ið Løgtingið viðgjørdu uppskotið hjá landsstýrinum at stytta freistina at útskriva val úr seks og niður í fýra vikur.

Tjóðveldið var á gosi, og fleiri av tjóðveldismonnunum ákærdu samgonguna fyri valdsmisnýtslu og at løggeva bara sær sjálvum til fyrimunar.

- Talan er um at vanvirða fólkaræðið og talan er einki annað enn um at tiltuska sær eyka tíð at ráða í, bóru teir í Tjóðveldinum fram.

Samgongumenn við løgmanni á odda vardu seg við, at tingið er fult arbeiðsført, inntil nýtt ting er valt, og tað vil siga inntil 19. januar.



*Orðaskiftið var hvast leygarmorgunin og serliga var Tjóðveldið á gosi*